Blákrossheimið

Við Pæturshús 2, FO-655 Nes
Tlf +298770770
T-post: blakrossheimid@blakross.fo
www. blákrossheimid.fo
www.datung.fo

**Vinnunevnd Løgtingsins**
Føroya Løgting
FO-100 Tórshavn

á Nesi, 12. november 2018.

**Viðv. løgtingsmáli nr. 17/2018:**

Blákrossheimið takkar fyri møguleikan at gera viðmerkingar til ætlaðu broytingarnar í rúsdrekkalógini.

Vit arbeiða við at veita viðgerð til ungfólk millum 15-18 ár og fólk omanfyri 18 ár og familjum teirra, sum antin beinleiðis ella óbeinleiðis líða undir ovurnýtslu av rúsandi evnum.

Eitt av høvuðsendamálunum í verandi rúsdrekkalóggávu er, at lógin skal virka tálmandi. Ein liberalisering kann føra økta nýtslu við sær, og hetta er ikki ein gongd leið at fara í okkara samfelagi, meta vit.

Viðvíkjandi løgtingsmáli nr. 17/2018: Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um innflutning og sølu av rúsdrekka, hava vit hesar viðmerkingar:

Vit meta at hetta uppskotið hevur avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir. Kanningar, sum Pál Weihe, yvirlækni og granskari, hevur gjørt her á landi vísa, at lættari atkoma at alkoholi økir um vandan fyri ovurnýtslu:

*"Støðan viðvíkjandi rúsdrekka og rúsevnum er her á landi betri enn so manga staðni. Grundin til, at rúsdrekkanýtslan í miðal er í lægra endanum í norðanlondum, skyldast okkara restriktivu lóggávu – bæði tá ræður um prís og atkomiligheit. Fólkaheilsuráðið hevur staðiliga frámælt, at vit gera Rúsdrekkasølu Landsins til eitt alment partafelag, og at vit seta á stovn fleiri sølustøð – eitt nú í keypsskálum, har nógv fólk kemur"*
https://d3b1dqw2kzexi.cloudfront.net/media/7078/virkisfrágreiðing_2013-2014.pdf

Kanningar eru eisini gjørdar í londum rundan um okkum, har tey eru komin til somu úrslit. Ringast av øllum er, at børnini, sum eisini eru okkara ábyrgdar- og arbeiðsøki, vera vanliga harðast rakt av øktari rúsdrekkanýtslu.

Bláktrossheimið
Við Pæturshús 2, FO-655 Nes
Tlf +298770770
T-post: blakrossheimid@blakross.fo
www. blakrossheimid.fo
www.datung.fo

Vísast kann eisini á at í Íslandi verður rúsløgur, sterkari enn 2,25%, bara seldur í einkarsøluni Vínbúðin. M.a er ferðafólkatalið í Íslandi økt munandi tey seinastu árini, hóast Ísland hevur eina stranga og tálmandi rúsdrekkalóg, tá talan er um sølu í vanligum handlum. Niðurstøðan viðv. ferðavinnuni er tí, at tað ber væl til at økja um hendan partin av inntøkunum í okkara samfelagi, hóast rúsdrekkalógin virkar tálmandi, sum í Íslandi.

Í Noregi verður rúsløgur, sterkari enn 4,7%, bara seldur í einkarsøluni Vinmonopolet, í Svøríki er styrkimarkið 3,5%, og alt sterkari verður bara selt í einkarsøluni Systembolaget í Svøríki.

Í øllum hesum londunum eru serstakar reglur fyri barrir og onnur skeinistøð, líknandi sum í Føroyum.

Okkara vitan og royndir siga, at ein lóg, ið tálmar nýtsluna, er als ongin forðing fyri tí samfelagsmenning, sum øll ynskja. Men lógarverkið kann verja tey, sum eru í vanda fyri at enda í beinleiðis ella óbeinleiðis rúsdrekkamisnýtslu – og fyri hesi ynskja vit at vera ein livandi og uppbyggjandi rødd.

Samanumtikið meta vit, at verandi rúsdrekkalóg er ein hóskandi karmur um ta nýtsluna, sum verður mett at vera neyðug her á landi.

**Blákrossheimið**

**Jütta J. Olsen**
leiðari